# Kommununurnar kunnu vænta stórar rokningar frá Landssjúkrahúsinum

**Tá ið kommununurnar fáa eldraøkið at umsita, kunnu tær vænta sær stórar rokningar frá Landssjúkrahúsinum, hvørja ferð ein sjúklingur verður noyddur at liggja óneyðuga leingi á sjúkrahúsinum**

ELDRAØKIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Vit bíða bara eftir, at eldraøkið verður lagt undir kommunurnar, so at Landsjúkrahúsið kann senda kommununum rokning uppá 3.500 krónur um dagin fyri hvønn røktarsjúkling, sum verður noyddur at liggja á Landssjúkrahúsinum, tí at ongin er at taka sær av teimum, sigur Jóan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækni*

Verður eldraøkið lagt undir kommunurnar, skulu tær kommunur, sum ikki røkja sínar skyldur á økinum, vænta sær stórar rokningar frá Landssjúkrahúsinum.

Tað er ein støðugur trupulleiki, at fólk noyðast at verða innløgd á Landssjúkrahúsinum tí at tey kunnu ikki útskrivast av tí at ongin er at taka sær av teimum.

Men hesa tænastuna ætlar Landssjúkrahúsið sær ikki at veita ókeypis í framtíðini, sigur Jóan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækni á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum.

Hann sigur, at á skurðdeildunum á Landssjúkrahúsinum er nakrar av sengrunum altíð upptiknar av røktarsjúklingum, sum eru liðugt viðgjørdur, men sum ikki kunnu útskrivast, tí at ongin er at taka sær av teimum.

– Talan er sostatt er ein rættiliga stórur partur av sengrunum upptiknar av fólki, sum als ikki hoyra heima á Landssjúkrahúsinum, men sum antin eiga at sleppa á stovn, ella eiga at koma undir heimarøktina.

Í summum førum er talan um røktarsjúklingar, sum hava ligið á Landssjúkrahúsinum í fleiri mánaðir, men sum ikki kunnu útskrivast, tí ongin er at taka sær av teimum, hvørki stovnur ella heimarøkt

Støðan er akkurát tann sama á medisinsku deild.

Jóan Petur Davidsen sigur, at sostatt eru tað fleiri sengur, sum vit ikki fáa brúkt til tað, sum tær eru ætlaðar til, nevniliga til sjúklingar, sum hava brúk fyri viðgerð.

Jóan Petur Davidsen sigur, at avleiðingin av hesum her, at í summum førum noyðast sjúklingar, sum hava brúk fyri viðgerð, at bíða óneyðuga leingi eftir at sleppa framat at fáa viðgerð.

– Hinvegin fáa vit illa útskriva sjúklingar, sum búgva heima, uttan at hava trygd fyri, at heimarøktin er til reiðar at taka sær av teimum.

– Hetta eru skattaborgarar, sum hava goldið skatt alt lívið, men nú tey veruliga hava brúk fyri at fáa nakað afturfyri, verða tey slept upp á fjall.

## Landssjúkrahúsið situr við Svartaperi

Jóan Petur Davidsen sigur, at hetta er ein trupulleiki, sum Landssjúkrahúsið hugsar ógvuliga nógv um, men ikki fær gjørt so nógv um.

– Hetta órógvar arbeiðsgongdina á Landssjúkrahúsinum rættiliga illa, tí tað leggur hald á so nógv av okkara arbeiðsorku.

– Men støðan í dag er tann, at Landssjúkrahúsið situr við Svartaperi og ikki fær røkt sína skyldu til fulnar, tí at politikarar og heimarøkt svíkja sínar skyldur so grovliga, sum teir gera á eldraøkinum.

Jóan Petur Davidsen sigur, at samstundis verður tað væntað og beinleiðis kravt av Landssjúkrahúsinum, at tað fæst sum mest burturúr teirri játtan, sum Landssjúkrahúsið fær.

– Men so leingi ein fittur partur av sengrunum eru upptiknar av røktarsjúklingum, fáa vit ikki røkt okkara arbeiðið so væl, sum tað verður væntað og kravt av okkum.

– Hetta eru skattaborgarans pening og vit hava ábyrgd fyri, at vit fáa sum mest fyri hann.

Og leiðandi yvirlæknin vísur samstundis á, at ein sjúkrahússong er dýr.

– Tað er ein rættiliga dýr loysn at hava røktarsjúklingar á Landsjúkrahúsinum. Tað kostar fleiri ferðir tað, sum eitt pláss á einum røktarheimi kostar. Eitt pláss í eini sjúkrahús song kostar kanska 3.500 krónur um dagin.

– Sostatt kundu nógv stovnspláss á røktarheimum ella í heimarøktini fingist fyri tað upphæddina, sum tað kostar Landssjúkrahúsinum at hava røktarsjúklingar liggjandi

– Tað, sum hendir, er at politikarar og heimarøktin turka trupulleikarnar upp í Landssjúkrahúsið.

Men samfelagsbúskaparliga er tað sera dýrt at lata sjúkrahúsini hanga uppá hesar útreiðslurnar, sum ellisheim, røktarheim og heimarøkt áttu at havt.

Jóan Petur Davidsen minnir á leiðarin í heimarøktini á sinni fekk ávaringar, tí hann kláraði ikki at halda játtanina.

– Tað er nógv fyri at hoyra heimarøktina at kalla breggja sær av, at hon klárar at halda játtanina. Einasta orsøk til at heimarøktin klárar at halda sína játtan, er, at hon rætt og slætt sýtur fyri at taka fleiri brúkarar uppí heimarøktina.

– Tá ið vit søkja Heimarøktina um at taka taka ábyrgdina av røktarsjúklingum á Landssjúkrahúsinum, kemur meiri enn so fyri, at heimarøktin beinleiðis noktar at taka fleiri fólk í skipanina, tí peningur er ikki til taks.

- – Undir slíkum umstøðum er gamaní at halda játtanina, tí tað, sum heimarøktin ger, er at turka trupulleikar, sum tey eiga, upp í Landssjúkrahúsið, sigur Jóan Petur Davidsen.

– Eg haldi ikki at tað er rætt, at játtanin hjá Landssjúkrahúsinum skal rakast so hart, bara fyri at heimarøktin skal klára at halda sína játtan, leggur hann afturat.

## Kunnu vænta sær rokning

Leiðandi yvirlæknin sigur, at sum støðan er nú, er eldraøkið eitt landsmál, men tosað hevur verið um at leggja eldraøkið út til kommunurnar.

Í Danmark er eldraøkið kommunal ábyrgd. Og í Ålborg hevur sjúkrahúsið gjørt bart og hevur sent kommununi rokning fyri hvørja song, sum er upptikin av røktarsjúklingum, sum av røttum ikki átti at ligið á sjúkrahúsi, men sum sjúkrahúsið ikki fær útskrivað, tí ongin er at taka sær av teimum.

– Kunnu vit so vænta, at Landsjúkrahúsið fer at gera tað sama, tá ið eldraøkið í Føroyum verður kommunalt, soleiðis sum talan er um.

– Ja, tað verður tað.Vit hava sæð fram til, at eldraøkið verður lagt undir kommunurnar, so at Landssjúkrahúsið kann senda kommununum rokningarnar fyri teir røktarsjúklingar, sum liggja á landssjúkrahúsinum.

Jóan Petur Davidsen sigur, at hvør sjúkrasong er so dýr, at ein rokning til kommunurnar fyri hesar útreiðslurnar, kundi kanska skunda undir kommunalpolitikarar at byggja eldraøkið út, so at tað nøktar tørvin.

Á heimarøktini er ongin viðmerking at fáa. Leiðarin, Mary í Garði, er burturstødd og økisleiðarin í Havn, sum hevur nógv teir størstu trupulleikarnir, er ikki at hitta.

---

## Føroyskur trúboðari til Senegal

TRÚBOÐARI
*Tíðindaskriv*



Mánadagin fer Lív Poulsen í Porkeri úr Føroyum til Senegal í vestur Afrika at virka sum trúboðari við trúboðarafelagsskapinum New Tribes Mission.

Lív er dóttur Daniel og Sigrid Poulsen í Skemmuni í Porkeri. Eftir lokna skúlagongd í Vági fór hon á studentaskúla í Hoydølum og tók prógv haðani í 1993.

Eftir hetta fór hon á sjúkrasystraskúla í Havnini og tók prógv haðani í 1998.

Heilt frá ungum av hevur Lív havt ynski um á onkran hátt at verða við í andaligum arbeiði. Fyrst var hugsan hennara at verða við á einhvønn praktiskan hátt, og var hetta ein orsøk til, at hon fór at læra til sjúkrasystir.

Eftir at hava tikið hesa útbúgving, fór hon í 1999 saman við einari vinkonu til Gambia í vestur Afrika við kristnum felgasskapi, sum eitur WEC international. Har arbeiddi hon á einum sjúkrahúsi í 14 mánaðir. Hesa tíðina fekk hon staðfest, at kall hennara var at arbeiða sum trúboðari burtur av.

Afturkomin úr Afrika fór Lív til North Cotes í Onglandi á bíbiuskúla hjá New Tribes Mission í tvey ár. Hetta var í 2001. Fyrra árið er bíbliuskúli, har frálæra verður givin í teimum grundleggjandi sannleikunum í skriftini. Seinna árið er venjingarskúli. Endamálið við venjingarskúlanum er at fyrireika næmingin bæði handaliga og andaliga at bera gleðiboðskapin til ein ættarbólk, sum ongantíð hevur hoyrt hann fyrr.

Tá Lív var liðug við skúlan hjá NTM, fór hon á málskúla í Albertville í Fraklandi. Har fekk hon frálæru í fronskum í úti við 1 ár. Neyðugt er at duga franskt, tí tað er handilsmálið í Senegal.

Trúboðarafelagsskapurin NTM, ið Lív fer at arbeiða við, var stovnaður fyri yvir 50 árðum síðan og er endamálið at boða evangeliið fyri ættarbólkum, íð ongantíð hava hoyrt tað fyrr, at umseta bíbliuna til móðurmál teirra og seta samkomur á stovn, ið kunnu klára seg sjálvar.

Felagsskapurin er eitt amboð at hjálpa samkomum at senda trúboðarar út. Samkomur úr yvir 25 londum hava sent sent yvir 3000 trúboðarar út við NTM. Teir virka í uml. 30 ymiskum londum. Av hesum eru uml. 25 úr Føroyum, og virka hesir í 7 ymiskum londum.

Í samband við, at Lív fer av stað fyrst í komandi viku, verður skipað fyri fráferðarsamkomu í Betania í Porkeri leygarkvøldið 26. februar kl. 20. Skráin hetta kvøldið verður fjølbroytt. Leiðarin fyri NTM í Føroyum, Símun í Túni kemur at tala. Heilsanir verða bornar fram og kórið syngur. Eisini verður ein hugnaløta aftanná við drekkamunni, og eru øll hjartaliga vælkomin at verða við.